Fríggjadagin kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 10.00 Morgunbøn.
Sunnudagin kl. 14.00 Møti við sunnudagsskúla. Fríðbjørg Michaelsen talar. Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 Morgunmøti.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið k. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti v/ Preben Hansen.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbliutími við Kristian Fríðrik Olsen, evni: 2. Kor. 2. kap.
Hóskvøldið kl. 19.00 Bønarløta.
Fríggjakvøldið kl. 22.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti við Kristian Fríðrik Olsen, kl. 21.00 Ungdómsmøti. Øll vælkomin. www.kuff.fo

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20.00 Bíbliutími 2. Tess. 3. kap.

**Betania, Skopun**
Bønarmøti verður í kvøld kl. 20.00.
Hóskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti. Aftaná møti venur kórið.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti við luttøku úr oynni. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Hóskvøldið kl. 20.00 Bønarløta.
Sunnudagin kl. 11.00 Halgunarmøti, Karina Magnussen talar. Kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18.00 Evangel. møti, loytnantur Ragnar Ludvig talar.
Mánadagin kl. 7.00 Morgunbøn. Øll eru vælkomin í Frelsunarherin.

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15.00 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Felagið Tórshavn, gongutúrur**
Sunnudagin 17. september, verður gongutúrur í Nólsoy: Eggjaklettur - Borðan. Túrurin er miðal tungur. Minst til at hava góð og heit gonguklæðir og matpakka við. Farið verður av Bursatanga kl. 9.30. Tilmelding. **Gongutúrurin 13. september er útsettur til mikukvøldið 20. sept.**

**Frá Eysturoyar gongufelag**
Ætlanin er at fara túr til Suðuroyar leygardagin 23. sept. kl. 10 av Havnini og heim aftur av Tvøroyri sunnudagin 24. sept. kl.17.30. Leygardagin verður farið í Hvannhaga og sunnudagin gongutúr úr Trongisvági til Fámjins (umleið 3 tímar). Tilmelding (við depositum á kr. 200,- at seta í Norðoya Sparikassa, Leirvík konta nr. 9865-1033381) á Kunningarstovunum tlf. 449449 (417060) og 444860 áðrenn fríggjadagin 15. sept. Kl.14.

**Føroyingafelagið í Odense**
Pisuveitsla ver›ur leygardagin 16. september kl. 19.00 í Musikhuset, Rasmus Rask Kollegiet, Elmelundsvej 4, 5200 Odense V.
Tilmelding áðrenn 15. september á tlf. 2683 8207 Jónbjørg ella 2846 5625 Jórun.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@tilhald.fo
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
***Mánadagin 11. september***
kl. 9.00-16.00 Skeið í horn og træhandverki, Thue Christiansen
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14.00-17.00 Kortspæl, landastrok, bobbspæl, telving, dart og onnur spøl
***Týsdagin 12. september***
kl. 9.00-16.00 Skeið í horn og træhandverki, Thue Christiansen
kl. 10.00-11.30 Vit syngja, Johann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15.00 **Hvørji tilboð hevur FK til smá húsarhald?** Sigrid D. Dalsgaard, húshaldslærari
***Mikudagin 13. september***
kl. 9.00-16.00 Skeið í horn og træhandverki, Thue Christiansen
kl. 10.00-12.00 Vælgerandi handverksætlan á loftinum
Kl. 15.00 Túrur við ella uttan stavar, úr Tilhaldinum yvir Strond og heim eftir Hoyvíksvegnum
***Hósdagin 14. september***
kl. 9.00-16.00 Skeið í horn og træhandverki, Thue Christiansen
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00 »Lesibólkur«.
kl. 14.00-16.00 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
***Fríggjadagin 15. september***
kl. 9.00-16.00 Skeið í horn og træhandverki, Thue Christiansen
kl. 10.00-12.00 Vælgerandi handverksætlan á loftinum

***Skeið verður í Matgerð undir kvøldskúlaskipanini í vetur. Eitt hold mikudag og eitt hold fríggjadag frá kl. 10.00-13.30. Lærari: Anne Grethe Harlou. Tilm. 316491 (Byrjað verður 27. - 29. sept.)***

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Dagtilhaldið er opið hvønn týsdag og hósdag frá 15-18.
***Hósdagin 14. september*** hugna vit okkum saman.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
Vit byrja aftur týsdagin 12. september kl. 15.00. Øll eldri eru vælkomin.

**Tilhaldið á Toftum**
*Tlf. 448690*
*Vit halda til í niðaru hædd á Vesturskin.*
*Teldupost: tilhaldnes@post.fo*
Opið er týsdag, mikudag og hósdag. Frá kl. 15.00 – 18,00
***Tilhaldið fer í summarfrí og byrjar aftur í september. Lýst verður nærri.***
*Vit hava hvønn dag ein góðan drekkamunn, eins og vit hava nógv spøl, og annað ítriv.*
*Vit ynskja at øll kenna seg væl og hugnað sær.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
*Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum.Tlf. 448279.*
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
***Mánadagin 11. sept.***
Boccia
***Týsdagin 12. sept.***
Telduhugni við Jens Dalsgaard
***Mikudagin 13. sept.***
Fimleikur
***Hósdagin 14. sept.***
Myndaveving v/ Gretu Olsen
***Fríggjadagur 15. sept.***
Opið hús

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl og bøkur. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. eisini eru bløðini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mikudagin 13. september.***
Um viðrar royna vit gongustavarnar, annars fara vit at boccia.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag kl. 9.30-17.30
Teldupostur: dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda
***Hósdag***
kl. 10.00 fimleikur
kl. 11.00 telda
kl. 13.30 bløðini verða lisin fyri sjónveik
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***


www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum




## Redaktiónsleiðari

### -Vilt tú vera við til at mynda dagsskránna í Føroyum?

Á Sosialinum sóknast vit eftir einum redaktiónsleiðara, sum saman við blaðstjóranum skal leggja til rættis framleiðslu av tíðindapartinum av Sosialinum.

Sum redaktiónsleiðari verður tú við til at seta dagsskránna í føroyska tíðindaheiminum, har Sosialurin og Miðlahúsið í dag fevna um ein týðandi part av tíðindastreyminum, har vit gjøgnum fleiri miðlapallar eru við til at mynda føroyska samfelagið.

Vit sóknast eftir einum persóni við royndum innan yrkið, sum hevur gott yvirblikk, og sum eisini dugir at planleggja gerandisdagin - tó at nógvir óvæntaðir lutir altíð kunnu stinga seg upp á eini rokmiklari redaktión. Coaching og evaluering av blaðfólkum og arbeiði teirra er eisini týðandi partur av starvinum.

Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving ella royndir innan tíðindaheimin.

Eitt grafiskt eyga og evni at seta upp tíðindasíðurnar sjálv/ur er eisini ein fyrimunur, men tó eingin treyt.

Løn sambært avtalu.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, stjóra, ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra. Eisini ber til at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo ella eirikur@sosialurin.fo.

Áhugaðir umsøkjarar skulu innan 16. oktober senda umsókn og viðkomandi upplýsingar til:

Sosialurin
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Umsóknir kunnu sjálvandi eisini sendast við telduposti til jan@sosialurin.fo

*Sosialurin er ein fyritøka í støðugari menning. Hvønn gerandisdag eru vit á gøtuni við hópin av tíðindum. Blaðið er eisini at finna á alnetinum, har vit eisini røkja tíðindaflutningin á portal.fo, planet.fo og sportal.fo.*
*Á Sosialinum starvast í dag um 25 starvsfólk.*






## MÓTTØKULEIÐARI TIL NORRÖNU

### Søkt verður eftir móttøkuleiðara til Norrönu at byrja skjótast gjørligt

Smyril Line bjóðar áhugavert og avbjóðandi starv, sum móttøkuleiðari í einum altjóða umhvørvi, har lyklaorðini eru:

- Ábyrgd
- Personlig avbjóðing
- Dygd
- Faklig menning
- Persónlig menning

Smyril Line sóknast eftir fólki við receptionist útbúgving og gjarna royndir sum leiðari. Tað er krav, at umsøkjararnir duga væl enskt, hava góð samstarvsevni, góðan teldukunnskap og duga at arbeiða undir trýsti uttan at missa yvir litið.

**Heilsuprógv fyri sjófólk krevst (ikki eldri enn 2 ár).**

Tað er ein fyrimunur at hava trygdarskeið (ikki eldri enn 5 ár).

Løn og setanartreytir eru smb. galdandi sáttmála undir FAS-skipanini við Føroya Fiskimannafelag. Størvini verða sett skjótast gjørligt.

Umsóknir og CV skulu sendast við telduposti til aðra av hesum tilskriftum:

crew@smyril-line.fo
hotel.manager@norrona.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og í dag selja og marknaðarføra vit Føroyar, Ísland, Noreg, Hetland og Danmark um allan heimin.

Høvuðsskrivstova felagsins er í Tórshavn. Eisini hevur Smyril Line skrivstovur í Hanstholm, Bergen, Reykjavík, Kiel og í Lerwick. Agentar eru í Svøríki, Finnlandi, Týsklandi, Eysturríki, Sveits, Benelux, Fraklandi og Italia.

SMYRIL LINE · EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

**SMYRIL LINE** · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM